# Bilarnir verða ikki umvældir

*Tveir danir frá teknisku deildini hjá løgregluni í Keypmannahavn hava verið í Klaksvík og gjørt tað, ið nevnt verður kanningar á staðnum, í samband við skottilburðin fyri stuttum. Greitt er, at sundurskotnu løgreglubilarnir verða ikki umvældir*

DAGFINN OLSEN

Í kjalarvørrinum av ógvusliga skottilburðinum í Klaksvík fyri stuttum, har unglingar skutu frá hond, hava tveir danir frá teknisku deildini hjá løgregluni í Keypmannahavn verið í Klaksvík og gjørt kanningar.

Sýðslumaðurin í Klaksvík sigur, at talan er um sonevndar kanningar á staðnum. Hendingin verður eftirgjørd og roynt verður at finna útav, hvat hendi, hvussu og hví.

Sýðslumaðurin í Klaksvík, Hans Djurhuus, sigur, at donsku løgreglumenninir eru vanir at gera kanningar av slíkum slag og rætta føroysku løgregluni eina hjálpandi hond.

Enn er eingin niðurstøða gjørd. Men tað er greitt, at teir báðir sundurskotnu løgreglubilarnir verða ikki umvældir. Løgreglan í Klaksvík hevur lænt bilar aðrastaðni. Seinni fær løgreglan í Klaksvík nýggjar bilar.

**Spøk stevna**

Annars fræddist úr Klaksvík, at norðoyarstevnan var friðarlig.

Tveir bilførarar vórðu tiknir fyri at koyra við kenning. Onkur svav rúsin av á støðini og onkur fór til hendurs. Men sum heild ein sera friðalig og góð stevna, verður sagt av politistøðini í Klaksvík. Mett verður, at sum heild mundu stevnugestirnir vera færri í ár, enn vanligt, og kemst hetta helst av ferðasambandinum, ið er darvað av, at Smyril er til eftirlit.



*Sundurskotnu løgreglubilarnir í Klaksvík koma ikki aftur í tænastu og løgreglan koyrir í læntum bilum, til nýggir bilar koma*

# Bátaframsýning vitjar

*Í dag, 6. juni, kemur M/S Nordwest til Føroya. Umborð er bátasýning við norðurlendskum bátum og Føroyar eru eisini umboðaðar*

DAGFINN OLSEN

Í dag kemur M/S Nordwest á Havnina. Skipið verður í Føroyum til 12. juni og hesar dagarnar verður møguleiki at vitja umborð. Umborð er nevniliga stór framsýning riggað til við norðurlendskum bátum. Sýningin nevnist Bátar og Fólk í Norðurlondum.

Sýningin hevur verið sera væl vitjað. Í fjør varð vitjað í 18 býum og meira enn 50.000 fólk vitjaðu umborð.

Í ár verður farið útum Svøríki at vitja og Tórshavn er partur av hesi ferð. Fleiri norðurlendsk lond hava verið við til at fyrireikað framsýningina og umborð á Nordwest er eisini eitt føroyskt seksmannafar. Sýningin er svensk og Fornminnissavnið stendur fyri føroyska partinum.

20 bátar eru við á sýningini. Norðurlond hava felags mentanararv og bátar og fólk ferðaðust um høvini. Men søgurnar eru mangar aftanfyri teir ymsu bátarnar og bátarnir eru sera ymiskir.

Nordwest kemur úr Stockholm til Føroya. Vitjað verður í 11 londum í summar og úr Havnini verður farið til Reykjavíkar.


## FRAMSÝNING
### í Smiðjuni í Lítluvík

við Helga Joensen og Anker Eli Petersen

| | |
|---|---|
| Sunnudag 4. juni | kl. 14.00 - 20.00 |
| Mánad. 5. - leygard. 10. juni | kl. 11.00 - 20.00 |
| Sunnudag 11. juni | kl. 14.00 - 20.00 |




3arin

SMS · Tel. 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

SANSIR TEL 355 355


# Andras á úrvalsliði

*Orkestur Norden er eitt úrvalslið av bestu tónleikarum á norðurlendskum tónleikaskúlum og í ár er føroyingurin Andras Olsen við, tá orkestrið í summar skal á konsertferð*

DAGFINN OLSEN

Undir leiðslu av dirigentinum Lü Jia, skal Orkestur Norden í juli á konsertferð í Svøríki, Noreg og Álandi.

Fyri fyrstu ferð er ein føroyingur við, tá hetta úrvalslið savnast. Tað er 22 ára gamli trombonleikarin Andras Olsen úr Havn, ið hevur vunnið sær sess í bólkinum.

Orkestur Norden sá dagsins ljós fyri 8 árum síðani sum úrslit av samstarvi millum Norønnafelagið, Norðurlendska samstarv Lions og Jeunesses Musicals. Bólkurin verður stuðlaður av ymsum norðurlendskum feløgum og stovnum.

Orkestur Norden er sett saman av bestu ungu tónleikarunum á hægru tónleikaskúlunum í Norðurlondum og bólkurin ferðast hvørt summar á konsertferð í Norðurlondum.

Í ár verður byrjað í Svøríki. Fyrst á skránni er venjing í 10 dagar, síðani eru konsertir á skránni. Farið verður til Oslo, Göteborg og Stockholm og ferðin endar á Álandi.

Bólkurin skal leika bílagt verk eftir danska tónasmiðin Poul Ruders, verk eftir Stenhammar, Rachmaninov og Sibelius.

Næsta ár eru ætlanir um konsertir í Onglandi og Skotlandi undir leiðslu av Okko Kamu.


*Andras Olsen, 22 ára gamal trombonleikari úr Havn, er við, tá úrvalsbólkurin Orkestur Norden hevur konsertir í summar*




*Heini O. Heinesen sigur, at hann kann ikki liva við tí, sumer farið fram og hann sigur, at tað er sjálvsagt, hann fer at reisa málið*

# Løgtingsmaður í øðini av framferðini hjá nevndini

*Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi kann ikki liva framferðini hjá nevndini fyri P/F Vágatunlinum og hann umhugsar nú at reisa málið aftur í løginginum*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Hetta hevur víst, at nevndin fyri P/F Vágatunnilin er yvirhøvur ikki skikkað at standa fyri arbeiðnum at gera tunnil undir Vestmannasundi.

Heini O. Heinesen, formaður formaður tjóðveldisfloksins á tingi, og formaðurin í vinnunevndini, er í øðini inn á framferðina hjá nevndini fyri P/F Vágatunlinum, nú hon hevur gjørt av at samráðast við J&K Petersen um at gera veg í sambandi við tunnilin, hóast Byggitek hevði lægsta tilboðið.

Og hann leggur ikki fingrarnar ímillum, tá ið hann skal lýsa sína hugsan um tað, sum er farið fram.

– Hetta vísir bara, at eg fekk fullkomiliga rætt í tí, sum eg førdi fram, tá ið málið um Vágatunnilin var til viðferðar í tinginum. Tað er kanska bara blivið uppaftur verri enn eg fryktaði fyri tá.

Hann sigur, at hetta er einki annað enn ein miðvís ætlan at slúsa arbeiðið niður í nakrar fáar, ávísar fólkaflokslummar.

– Og í longdini er einasta endamálið at skapa eitt Petersen/Arge og Weihe monopol, sum í framtíðini skal fáa einkarrætt uppá alla tunnilsgerð í Føroyum. Tí tað er onki at ivast í, at tann, sum fær hetta arbeiðið, fer at fáa alt tunnilsarbeiðið í Føroyum framyvir.

Heini O. Heinesen sigur, at framferðin hjá nevndini í Vágatunlinum vísir, at avgerð varð longu tikin frammanundan um, hvør skuldi fáa arbeiðið.

Og tað skal ikki undra hann um ikki avgerð eisini longu er tikin um, hvør skal fáa arbeiðið at gera sjálvan tunnilin.

– Tað skal nokk vísa seg at blíva tað norska felagið, sum J&K Petersen hevur gjørt samstarvsavtalu við.

**Reisa málið í løgtinginum**

Heini O. Heinesen sigur, at hann skilir ikki, hvussu løgtingið kann liva við at verða drigið so upp á tráð, sum tað er í hesum málinum.

–Tað einasta, sum vit hava fingið burturúr hesum, er, at nevndin fyri P/F Vágatunlinum hevur brúkt fleiri milliónir, uttan at spakin er settur í jørðina enn.

– Tað er eisini púra greitt, at hevði Landsverkfrøðingurin sloppið framat, var tunnilin kanska longu skotin ígjøgnum, tí tað einasta, sum er komið burturúr minguleringunum við at stovna eitt partafelag, ístaðin fyri at lata Landsverkfrøðingin gera arbeiðið, er, at arbeiðið er seinkað í tvey ár, tí tað er neyvan ein strika flutt í sjálvum projektinum, sum Landsverkfrøðingurin gjørdi á sinni.

Heini O. Heinesen sigur, at í øllum førum kann hann ikki sjálvur liva við tí, sum er farið fram.

– Eg haldi, at eftir hetta hanga bæði landsstýrismaður í vinnumálum og nevndin fyri Vágatunlinum í einum klønum tráði.

– Tá ið tað ber til at skapa slíkt rumbul um teir fyrstu vegastubbarnar, sum skulu gerast, hvat skulu vit so vænt okkum at arbeiðnum annars, spyr hann

Hann sigur, at tað er sjálvsagt. at málið verður tikið upp.

Hvussu tað verður, veit hann ikki enn, tí enn er ongin avgerð tikin.

Men eitt, sum hann umhugsar, er at fáa málið reist, nú tingið kemur saman at viðgera eina eykajáttan til postverkið.

–Nú er tað púra greitt, at Landsverkfrøðingurin má meiri upp í málið og tað má løgtingið syrgja fyri, sigur Heini O. Heinesen.





| | |
|---|---|
| **AMSTERDAM** 2997,- Tur/retur via Billund **) Ferðaavgjøld íroknað | **ATHEN** 3296,- Tur/retur via Keypmannahavn *) Ferðaavgjøld íroknað |
| **LISSABON** 3296,- Tur/retur via Keypmannahavn *) Ferðaavgjøld íroknað | **LONDON** 2991,- Tur/retur via Billund **) ella Keypmannahavn *) Ferðaavgjøld íroknað |
| **NICE** 3107,- Tur/retur via Billund *) Ferðaavgjøld íroknað | **PARÍS** 3010,- Tur/retur via Billund **) Ferðaavgjøld íroknað |
| **VENEDIG** 3095,- Tur/retur via Keypmannahavn *) Ferðaavgjøld íroknað | **DUBLIN** 3094,- Tur/retur via Billund *) Ferðaavgjøld íroknað |

**Bíligir ferðaseðlar frá Maersk**

Frá 1. juli til og við 13. august ber til at ferðast við flogfari millum Føroyar og onnur lond í Evropa, so bíliga sum ongantíð áður. Einastu treytir, at fáa bíligar ferðaseðlar, eru vanligar apex-treytir, umframt at minst tvey vaksin skulu ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

**Børn undir 12 ár fáa 50% í avsláttri av flogprísium, tá ferðast verður saman við vaksnum**

*Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan og í tíðarskeiðinum 1. juni 2000 til og við 16. juli 2000. Bíleggingar kunnu ikki broytast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Minst tvey vaksin skulu ferðast saman.*
**) Gisting eina nátt í Danmark (ikki íroknað)*
***) Flogið verður víðari sama dag*

MAERSK AIR